# Full ferð á Atlanticpaine

Sum so nógva aðrastaðni hava tey úr at gera á termo- og glasvirkinum Atlanticpaine í Kollafirði.

Høvuðsframleiðslan hjá virkinum er termoglas til vindeygu og úthurðar, men tey gera eisini glas til innhurðar og skilaveggir. Harumframt ger virkið spegl í øllum støddum og sniðum eftir máti og skabelón. Skalt tú hava eina mynd í ramma, kann Atlanticpaine eisini klára ta uppgávuna, og skal myndin standa á einari glashyll, er tað eisini ein uppgáva, sum Atlanticpaine kann loysa.

Virkið á havnarlagnum í Kollafirði arbeiðir eisini við plexiglasi. Tað fæst úr tveimum upp í tíggju millimetra tjúkd og kann fáast í øllum skapi, tí virkið hevur eina maskinu, sum kann boyggja plexiglas. Árni Svartafoss, stjóri, sigur, at tá ódnirnar herjaðu javnan fyri nøkrum árum síðani, valdu mong at fáa sær 10 millimetra plexiglas uttan á rútarnar ístaðin fyri plátur. Fyrimunurin er, at tað sæst ígjøgnum plexiglas, og harafturat er tað sterkt.

Teir størstu kundarnir hjá Atlanticpaine eru virkini kring landið, sum gera vindeygu, men fólk kunnu eisini fáa virkið í Kollafirði at skifta termorútar fyri seg. Tá verður mát tikið á staðnum, síðani verða rútarnir gjørdir á virkinum, og virkið sendir so fólk at skifta rútarnar.

Fyrr í ár fekk Atlanticpaine nýggjan eigara, tá Heðin Zachariassen í Streymnesi keypti virkið. Átta fólk arbeiða á virkinum.






















